# Dráttur seta tjúkka striku undir føroyameitaraheitið





*Kvinnurnar hjá Drátti gjørdu í gjár øllum púra greitt, at tær hava besta kvinnuliðið í flogbólti í hesum kappingarárinum*

**MEISTARADEILD MENN**

| D | V-T | Sett | Stig | |
|---|---|---|---|---|
| 1. Fleyr | 15 | 13-2 | 41-15 | 19 |
| 2. Mjølnir | 15 | 10-5 | 36-19 | 16 |
| 3. SÍ | 15 | 9-6 | 33-23 | 12 |
| 4. ÍF | 15 | 6-9 | 26-31 | 9 |
| 5. Nøvan | 16 | 0-16 | 0-48 | 0 |

**MEISTARADEILD KVINNUR**

| D | V-T | Sett | Stig | |
|---|---|---|---|---|
| 1. Dráttur | 19 | 17-2 | 54-22 | 24 |
| 2. TB | 19 | 11-8 | 40-27 | 18 |
| 3. ÍF | 19 | 11-8 | 43-32 | 16 |
| 4. SÍ | 19 | 11-8 | 40-34 | 15 |
| 5. KÍF | 19 | 4-15 | 20-50 | 7 |
| 6. Mjønir | 19 | 3-16 | 19-51 | 4 |

**Kvinnurnar hjá Drátti vunnu um vikuskiftið 3-0 á nærmasta kappingarneytanum í meistaradeildini í flogbólti. Liðið úr Vágum staðfesti harvið sína støðu sum landsins besta kvinnulið**

FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í gjár spældu tey bæði fremstu liðini í meistaradeildini hjá kvinnum ímóti hvørjum øðrum. Dráttur hevur ligið á odda alt kappingarárið, meðan steypavinnararnir úr TB seinastu vikurnar hava gjørt sítt ítarsta fyri at fáa Drátt aftur.

Hetta eydnaðist ikki. Og um vikuskiftið staðfesti Dráttur sína støðu sum landsins besta kvinnulið í flogbólti.

TB var á vitjan í Vágum, og hóast tað undan dystinum var greitt, at TB fór ikki at fáa Drátt aftur í kappingini um FM, so vildi liðið úr Vágum gera greitt, at tær hava vunnið gull og eru besta liðið.

Hetta eydnaðist eisini, tí Dráttur vann dystin 3-0. Settini vóru tøtt og spennandi, men hvørjaferð var tað meistaraliðið, sum hevði munin og vann 25-23.

Liðið hjá Drátti hevur verið rættiliga støðugt alt kappingarárið, og hóast tær kiksaðu eitt sindur í steypakappingini, tí har vunnu tær seg ikki fram í finaluna, so hava tær í landskappingini verið greitt tað besta liðið.

### Tveir tryggir sigrar

Tveir aðrir dystir vóru í meistaradeildini hjá kvinnum um vikuskiftið, og báðir endaðu við tryggum sigrum. Í Vágum spældu SÍ og KÍF, og her vann SÍ 3-0 við settúrslitunum 25-23, 25-15 og 25-17.

Í Klaksvík skuldi Mjølnir gera eina seinastu roynd at sleppa av aftasta plássið, tá ið ÍF vitjaði, men kvinnurnar úr Klaksvík megnaðu bert at vinna eitt sett, og so vann ÍF dystin 3-1. Settúrslitni vóru 15-25, 24-26, 25-22 og 14-25.

Harvið er tað avgjørt, at Dráttur vinnur FM, og at Mjølnir endar aftast í deildini.

## Mjølnir og Fleyr spæla um uppflyting

**Bestu kvinnuliðini hjá Mjølni og Fleyr skulu spæla um, hvat av feløgunum skal spæla í meistaradeildini næsta kappingarár**

FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað vóru dagar, tá ið Mjølnir og Fleyr kappaðust um føroyameitaraheiti í kvinnuflogbólti. Í ár er støðan ein onnur. Fleyr spælir í næstbestu deildini, og Mjølnir liggur aftast í meistaradeildini.

Reglarnar siga, at eingin beinleiðis niðurflyting er, men aftasta liðið í meistaradeildini skal spæla uppflytingardyst ímóti besta liðnum í 1. deild, og hesin dysturin verður í ár ímillum Mjølnir og Fleyr.

Mjølnir var rættiliga við í toppinum í kvinnuflogbólti í fjør, men Klaksvíksfelagið er við at byggja eitt nýtt lið upp við ungum spælarum úr felagnum, og hetta tekur nakað av tíð.

Avgerandi dysturin um, hvørt tað verður Mjølnir, sum yvirlivir í meistaradeildini, ella um tað verður Fleyr, sum skal flyta upp, verður í ítróttarhøllini á Kambsdali týskvøldið 21. mars kl. 19.45

## Mjølnir skuldi stríðast fyri sigrinum

**Mjølnir tryggjaði sær silvur, og ÍF misti møguleikan fyri bronsu, tá ið Mjølnir vann 3-2 á ÍF í KÍ-høllini í gjárkvøldið**

FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Seinastu avgerðirnar í toppinum í meistaradeildini hjá monnum fullu í gjárkvøldið. Dysturin ímillum Mjølnir og ÍF var avgerandi fyri, hvørji lið skuldu hava møguleikan at vinna silvur og bronsu í seinasta umfarinum, sum verður um vikuskiftið.

Kravið hjá ÍF var, at liðið vann á Mjølnir, tí so høvdu fuglfirðingar møguleikan at vinna bronsu, meðan teir góvu SÍ enn ein møguleika at fáa Mjølnir aftur í kappingini um silvurið.

Men tað endaði við, at Mjølnir vann tann javna og spennandi dystin við settmuninum 3-2. Dysturin í KÍ-høllini gjørdist drúgvur og spennandi, men tá ið hann varð liðugur, var tað greitt, at Mjølnir hevur vunnið silvur og SÍ hevur vunnið bronsu.

Hetta kunnu dystirnir í seinasta umfari um vikuskiftið ikki broyta. Tað stendur eisini fast, at Nøvan, sum einki sett hevur vunnið í hesum kappingarárinum, endar niðast í meistaradeildini.